3 frá 3'aranum

FLØGUUMMÆLI

Dagfinn Olsen

Petter
Bananrepubliken



Sviar hava veri› frammaliga á altjó›a tónleikapallinum og ta› eru teir enn. Teir hava í stóran mun megna› ta›, i› grannalondini bert hava droymt um. Nøvn sum ABBA, Roxette og Ace of Base siga eitt sindur um dygd og dugnaskap svia.

Tó at vit í Føroyum hoyra fitt av norskum tónleiki, ser ikki nógv at hoyra av svenskum - um vit ikki telja Vikingarna vi›.

Ein n‡ggj fløga kallast Bananrepubliken og er vi› Petter.

Hetta er svenskur rapptónleikur á svenskum. Ein sera egin fløga. Hon svingar væl. Rútmurnar eru ta›, i› summi kalla »feitar«. Tónleikarar tosa er um »groove« og at ta› »groovar«. Ta› ger tónleikurin á hesi rapp-fløguni.

Tó. Ta›, sum ger, at hon er so egin, er vali› av ljó›førum. T.d. er til tí›ir ein urga langt frammi í ljó›myndini. Sum ein stovuurga. Ta› er ikki júst ta›, i› ein er vanur at hoyra í rapp-tónleiki. Men ta› riggar.

Henda fløgan er til teirra, i› dáma væl rapp. Eingin ivi um ta›. Til teirra, i› dáma rapp og hav ahug at kunna seg vi› svensku greinina av hesum tónleikaslag

Rave un2 the joy fantastic

Prince kenna tey flestu. Og tey flestu hava eisini eina meining um hann. Summi meta hann sum flogvit. Onnur eru meira varin í sínum metingum.

Men sí›ani hann í áttatiárunum kom fram vi› Purple Rain, hevur hann megna› at veri› áhaldandi millum stjørnurnar á tónleikahválvinum. Millum tey stóru nøvnini. So óiva› er gó›ska í.

Um hann nú eitur Prince ella hatta tekini i› ver›ur nevnt »love sign«, veit eg ikki.

Á hesi n‡ggju fløguni stendur, at tekini er tann, i› framførir og hevur skriva› løg og tekst. Hin vegin er ta› Prince, i› hevur framleitt (producer).

Stílurin er, sum vant, forvitnisligur poppur. Prince er Prince. (Ella er hann »love sign«). Hann skuffar ikki. Gó›ur og vælframleiddur tónleikur og hann, Prince, setir síni fingramerki á.

Solei›is er ta›. Og solei›is skal ta› vera.

Enigma
The screen behind the mirror

Eitt stórt og kent navn. Eg kenni tíverri líti› til Enigma.

Hetta er teldutónleikur. Ofta er hetta sagt vi› negativum undirtónum. Ta› kann tó ikki sigast um Enigma.

Hetta er stórfingin tónleikur vi› sera vælljómandi kórútsetingum, sum t‡dningarmiklum parti av tónleikinum. Stórt kór. Flott kór.

Djúpur teldubassur og gó›ar trummur. Óiva› ein fløga, i› hóskar stak væl, um ein eigur stórt og dygdargott fløguanlegg.

Framúrskarandi gó›ska. So er ta› meira upp til hin einstaka, um hugurin stendur til teldukendan tónleik. Synth.

Men ein flott framlei›sla. Og havni› Enigma er ikki ókent, hóast ta› ikki er umbo›a› í mínum savni og ikki sigur mær so nógv, so er slík framlei›sla frægd fyri oyruni.

Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Ítróttin kanst tú eisini lesa á alnetinum: www.sosialurin.fo

Trupulleikin skal loysast

Eftir at tað seinasta ár vísti seg, at vatnið ikki setur nóg væl frá vøllinum í Klaksvík, hevur býráðið nú tikið stig til at loysa trupulleikan

Jákup Mørk

Flestu fótbóltsáskoðarar munnu minnast myndirnar frá seinasta heysti, tá KÍ á heimavølli vann FM-heitið.

Vunna FM-heitið var tó ikki høvuðsorsøkin til, at hesin dysturin gjørdist so minnisríkur, tí umstøðurnar, sum dysturin varð leiktur undir, gjørdust eitt nógv heitari samrøðuevni enn sjálvur dysturin.

Vatnpolo

Somikið illa var statt, at útvarpsmaðurin helt, at spælið var mest álíkt vatnpolo, og eftir dystin vóru røddir eisini frammi um, at var tað ikki fyri týdningin, sum dysturin hevði, so varð hann útsettur.

Orsøkin til nógvu og stóru hyljarnir er heilt einfalt, at skúmlagið, sum er undir sjálvum graslíkinum, er ov tætt, og at vatnið tískil ikki setur ígjøgnum vøllin, tá nógv avfall er.

Okkurt graml hevur verið um, at dreniskipanin á vøllinum ikki hevur verið nóg góð. Núverandi dreniskipanin er tó hin sama, sum var undir gamla vøllinum, so tað er ikki hesum, trupulleikin viðvíkur.

Hetta er kanska ikki nakar trupulleiki, tá slíkur vøllur verður gjørdur til týsk viðurskifti, men Føroyar eru nú ikki Týskland, og krøvini til ein fótbóltsvøll eru tí eisini ymisk.

Nýggjan vøll

Í seinastu útgávu av Norðlýsinum viðgerð blaðið hetta mál, og hava teir í hesum sambandi tosað við Jógvan við Keldu, býráðsformann í Klaksvík.

Okkum hevur ikki eydnast at fáa fatur á Jógvani, men í samrøðuni við lokala blaðið sigur hann, at teir í næstum skulu hava fund við týska Polytan, sum hevur latið vøllin.

Jógvan sigur víðari, at málið í longri tíð hevur verið á samráðingarstøði í umsitingini hjá býráðnum, men at hetta hevur gingið ov trekt. Tískil krevur býráðið nú, at nakað skal henda í málinum, soleiðis at trupulleikin kann loysast. Um einki gerst, ætlar býráðið í seinasta lagið at krevja nýggjan vøll, sigur Jógvan við Keldu at enda við Norðlýsið.

Fyrr hevur verið tosað um, at hol skulu borast í vøllin, so vatnið kann seta ígjøgnum, men sum skilst, verður hetta ikki mett at vera ein haldgóð loysn.

Vónandi fæst greiða á hesum máli, soleiðis at tað aftur gerst spælandi í Klaksvík, hóast tað av og regnar nakað illa. Slíkar umstøður, sum gjørdu seg galdandi seinasta ár, tæna í hvussu so er ikki fótbólti okkara

Umstøðurnar at leika avgerandi dystin um FM-heitið vóru alt annað enn góðar. Sum sæst á myndini, vóru stórir hyljar allastaðni á vøllinum

Mynd: Jan Müller

Finaluluttakararnir skulu finnast

Í kvøld og í annakvøld verða tær báðar seinnu hálvfinalurnar hjá monnunum leiktar uppi á Hálsi, og líkt er til, at talan gerst um tveir sera spennandi dystir

Seinast teir hittust, fingu báðir reytt kort, men Ingi sat yvir sunnudagin, og er tískil tøkur hóskvøldið, meðan Bjarni má sita uttan fyri hesu ferð

Mynd: Álvur Haraldsen

Jákup Mørk

Spennandi sær tað út, nú seinnu hálvfinalurnar hjá monnum skulu leikast. Í báðum teimum fyrru dystunum var eittans mál á muni, so ilt er at taka dagar ímillum, hvørji lið vera at meta sum favorittar til finalusessirnar.

Dystirnir

Í kvøld kl. 19.00 verður dysturin millum Neistan og StÍF, sum liggja á ávíkavist øðrum og triðja plássi í landskappingini við sama stigatalið.

Liðini hava hitt hvørt annað tríggjar ferð í hesum kappingarárinum, og av hesum hava teir báðir seinastu dystirnir verið sera javnir, meðan StÍF vann fyrsta dystin í landskappingini sera sannførandi..

Stutt fyri jól endaði landskappingardystur teirra millum við javnleiki, og fyri tveimum vikum síðani varð dysturin avgjørdur við einum beinleiðis tríggja metra kasti frá John Petersen.

Hóskvøldið kl. 20.00 verður so seinasta hálvfinalan leikt, og eru mótstøðuliðini í hesari teir báðir risarnir, Kyndil og VÍF.

Higartil hevur ikki skorist serliga væl hjá Kyndli í landskappingini. Ov nógvir dystir eru taptir, men fyri flestu av tapunum er galdandi, at hesi hava verið við minst møguligum muni. Eitt nú hava teir tríggjar ferð leikt móti vestmenningum í landskappingini, og eru tveir av hesum dystum taptir við ávíkavist einum og tveimum málum, meðan triði dysturin endaði við javnleiki, eftir at Kyndil hevði havt greiða leiðslu fyrr í dystinum.

Í steypakappingini gekst tó betur, og fyrru hálvfinaluna í Vestmanna megnaðu kyndilsmenninir at vinna við einum máli. Spurningurin er so, um hetta er nóg mikið til at tryggja teimum finalusessin. Kyndilsliðið er eisini skert nakað, tí toppskjútti teirra, Bjarni Wardum, hevur leikbann, orsakað av reyða kortinum, sum hann fekk í seinasta dystinum.

Lítið er tó at ivast i, at hetta verður ein rokmikil dystur, tí hvørgin parturin vil lúta, og serliga fyri kyndilsliðið má sigast, at finalusessurin er av alstórum týdningi, nú tað longu er líkt til, at teir hava útspælt sín leiklut í landskappingini.